## Páskafrøi í Frelsunarherinum

**Havn:** Um høgtíðin hevur Frelsunarherurin fingið vitjan úr Noregi.

Møtini byrja skíriskvøld kl. 18 har major Wenche Walderhaug talar og Poul Heri Midjord syngur. Møtini halda fram um vikuskiftið við møtum har Kristian Nygård úr Noregi talar.

Páskamorgun verður serstøk páskafrøi í møtisalinum. Møtt verður kl. 8 um morgunin og á skránni er morgunmatur og páskasangur.

## Stevna í kirkjukjallaranum

Gøta: Páskastevnan byrjar við gudstænastu í Gøtu kirkju skírisdag kl. 12 og síðani verður hildið á allar páskadagarnar.

Gudstænastur verða í kirkjuni høgtíðsdagarnar og møtir øll kvøldini í kirkjukjallaranum við talarum og sangarum úr Eysturoynni og aðrastaðni frá.

Meðan møtini eru, verður skipað fyri barnaansing. Páskakvøld verður haraftrat savnað inn fyri nýggja missiónshúsinum, ið ætlanin er at byggja í Gøtu.

## Tey andaligu viðurskiftini

Umstøðurnar at hava slíkar páskastevnur hava sjálvandi sítt at siga. Men boðskapurin hevur kortini altíð verið hin sami.

- Jú, vit hava eisini havt nógvar góðar stevnur úti í ítróttarhøllini á Skála. Men hóast vit nú eru í Skálafirði, er málið kortini hitt sama – at menniskju skulu verða frelst.

- Tað hava vit eisini upplivað á undanfarnum páskastevnum, sigur Jóan Pauli.

Á páskastevnuni hevur Jóan Pauli onga fasta uppgávu sum so. Men sum hann sigur tað:

– Vit í leiðsluni skulu altíð vera klárir, um tað eru fólk sum ynskja hjálp ella samtalu um andalig viðurskifti.



*- Okkara ynski er at menniskju skulu verða frelst, sigur Jóan Pauli Jacobsen í Kelduni*

# Fólk skulu fáa eina góða uppliving

**Seinnapartin í morgin byrjar stóra páskastevnuni í Kelduni í Skálafirði. Í longri tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika hesa stevnuna – bæði praktiskt og andaliga**

PÁSKASTEVNA

*Orð & mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Keldan:** Tað er nógv stákan úti í gongini her í samkomubygninginum í Skálafirði.

Í einum horni standa tveir menn og pakka út eina rúgvu av stólum. Í einum øðrum horni standa nakrir menn boygdir niður yvir eitt diagram við elektriskum installasjónum.

Í køkinum er øgiligt virksemi. Arbeitt verður av allari megi at fáa henda lidnan til páskastevnuna, sum byrjar seinnapartin skírisdag.

Millum hesar menn stendur Jóan Pauli Jacobsen úr Skálafirði. Hann er við í leiðsluni fyri samkomuna, og hevur sjálvsagdan áhuga í at arbeiðið skal verða gjørt væl, og haraftrat verða liðugt til tíðina.

Hansara áhugi liggur sjálvandi eisini áhugi í tí andaliga partinum av stevnuni.

- Eg vóni, at mong menniskju koma til frelsu á hesi páskastevnuni, sigur Jóan Pauli við Sosialin.

### Ein góð uppliving

Jóan Pauli hevur verið á mongum páskastevnum áður. Nú verður stevnan hildin á øðrum sinni í Kelduni.

Fyrireikingarnar til ársins páskastevnu hava vart í langa tíð, bæði praktiskt, men ikki minst andaligt.

Í longri tíð hava menn og kvinnur gjørt eitt stórt arbeiði við at rigga alt so væl til inni í tí stóra bygninginum, soleiðis at ein stevna av slíkari støðd kann haldast her.

Somuleiðis hava tey lagt seg eftir, at tann andaligi parturin ikki liggur eftir. Í ár verða hjúnini Anne og Stephan Christiansen høvuðstalarar.

- Jú, vit hava fingið hetta parið úr Noregi sum høvuðstalarar í ár. Og tí vænta vit okkum eina sera góða stevnu.

- Vit vóna eisini at rættiliga nógv fólk fer at koma higar, og at tey fáa eina góða uppliving við Harran, sigur hann.

> *Vit seta onga avmarking á, og tí skal alt Guds fólk vera vælkomið higar*

### Eingin avmarking

Á stevnuni verða tiltøk av ymiskum slagi, bæði konsertir, vanlig møtir, kvinnumøtir, mansmøtir og annað.

Pláss verður eisini givið til fríløtur, har fólk fáa møguleika at hugna sær saman við hvørjum øðrum.

Tað er gott nokk samkoman í Kelduni sum skipar fyri stevnuni. Men tá tað er sagt, er stevnan kortini opin fyri fólki úr øllum samkomum og úr øllum landinum.

- Vit seta onga avmarking á, og tí skal alt Guds fólk vera vælkomið higar, sigur Jóan Pauli.